# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Lykladystur í Vági



*Tjaldur er í løtuni eitt stig aftan fyri VB. Sunnudagin bresta liðini saman í Vági, og tað líkist longu nú einum avgjørdum lykladysti*

**Tjaldur hevur bitið fast frá sær, og um vikuskiftið skulu tær aftur til styrkisroynd. Hesa ferð í Vági**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrstu umførini av Sunset-kappingini hava givið væntaðu myndina, har Stjørnan er lopin undan hinum.

Fyri tað nógva hevur stílurin verið flúgvandi, men í Runavík seinastu vikuskiftið noyddist Stjørnan veruliga at arbeiða yvir, fyri at halda Tjaldri frá sær.

Júst Tjaldur hevur verið fríska íkastið til kappingina í vetur, og tær togast í løtuni við VB um rættin at seta seg á plássið undir Stjørnuni. Sunnudagin er fyrsti fjórðingurin av kappingini lagdur aftur um bak, og skal metast eftir stigatalvuni, so er dysturin sunnudagin ein av avgjørdu lykladystunum, sum koma at viga heilt tungt, tá tað í vár skal gerast av, hvør fer saman við Stjørnuni í finaluna.

VB hevur víst stóra styrki. Seinast við sannførandi útisigri móti Neistanum. Og á heimavølli eru tær vanliga sera tungar at syfta. Tjaldur hevur hinvegin prógvað sínar ætlanir um at vera við í oddinum, og sunnudagin fæst at vita, hvussu langt ávegis tær eru komnar í sínum ætlanum um veruliga at vinna seg heilt fram í oddin.

Í hinum báðum dystunum er talan um sera greiðar favorittar.

Neistin spælir á útivølli móti StÍF, og har eru tær bláu greiðir favorittar.

Og í Klaksvík verður talan um hálva sensatión, um Kyndil megnar at skapa bara nøkunlunda spenning um úrslitið móti Stjørnuni, sum altso hevur skúgvað alla mótstøðu til viks higartil.

# Formula-deildin er avgreidd



*Talan var um satt ódnarveður, tá seinasta umfarið av Formula-deildini skuldi spælast*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

**Kappingarnevndin hjá FSF hevur nú gjørt av, at avblástu dystirnir frá 27. umfari í Formula-deildini enda 0-0**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sambært kappingarreglunum fyri fótbólt skulu dystir, sum verða blástir av vegna veður, takast uppaftur, tá høvi býðst.

Hinvegin rúma reglurnar eisini møguleika at gera undantak frá hesum, og tað er hetta, sum Kappingarnevndin hevur nýtt.

Sveinur Tróndarson, formaður í Kappingarnevndini hjá FSF, sigur, at teir fyrst av øllum valdu at kanna lógarverkið og at fáa feløgini at siga sína hugsan.

- Feløgini hava øll viðmælt, at dystirnir ikki verða spældir lidnir. Í hagtølunum koma dystirnir at enda við 0-0 javnleiki, men tað verður týðiliga frámerkt, at dysturin varð avblástur vegna veður, sigur Sveinur Tróndarson.

Teir tríggir dystirnir, sum vórðu avblástur, vóru EB/Streymur-HB, ÍF-B71 og Víkingur-KÍ. Dystirnir, NSÍ-Skála og B36-B68, vórðu avgreiddir, og tá hesir báðir endaðu við heimasigri, var seinasta restin av spenningi um heiðursmerki og europiska luttøku kortini avgreiddur.

Sjálvur segði Sveinur Tróndarson alt fyri eitt, tá dysturin við Margáir millum EB/Streym og HB var avblástur, at stóð tað til hansara, so var kappingin tá av.

Hinvegin vildi Kappingarnevndin ikki fremja avgerðina í óðum verki. Eftir at løgfrøðiliga ráðgevingin hevði givið grønt ljós, varð farið til feløgini við fyrispurningi, og hesum hava tey nú øll tikið undir við.